Tíðindablaðið
sosialurin
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov

**Marknaðardeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Jústinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini

**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin

**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

# Hvat hendir í Fólkaflokki

## *Oddagrein*

NÓGV hevur verið gitt, hvussu leingi henda samgongan man halda, nú fullveldismálið tykist verða steðgað upp ella komið til eitt vegamót, har ein ella onnur avgerð skal takast um støðuna hjá samgonguflokkunum. Vit hava sæð og hoyrt, hvussu býttur fólkaflokkurin stendur í hesum máli. Tað hava veljarakanningar víst, og tað hava úttalilsi hjá framstandandi fólkafloksmonnum prógvað. Í blaðnum í dag úttala tveir av landsstýrismonnunum hjá flokkinum seg rættiliga avgjørt um málið og rógva framundir, at nú má upprunaliga linjan, sum flokkurin hevur lagt saman við Tjóðveldisflokkinum, sleppast og ístaðin skal setast í verk ein stig fyri stig linja, nakað, sum líkist tí, ið Javnaðarflokkurin er gingin inn fyri.

SPURNINGURIN er so bara, hvat er taktikkur og hvat er veruligur politikkur. Tað er eingin loyna, at fólkafloksmenn eru útspekuleraðir taktikkarar í politikki, og nú teir hava buktina og báðar endar í Tinganesi, kunnu gera eisini gera júst sum teimum lystir. Tað einasta, sum teir mugu ansa eftir, og sum løgmaður og formaður floksins tykist hugsa nógv um, er, hvussu man heldur flokkin intaktan. Tvs. hvussu kann man líkasum orða seg eitt sindur veikari í fullveldismálinum við t.d. at tosa um stig fyri stig loysn - uttan harvið at fornerma og stoyta teir mest rabiatu loysingarmenninar í flokkinum!

Hetta er júst kjarnin í málinum og orsøkin til, at oddamaður fólkafloksins hevur havt ein til tíðir lágan profil í fullveldismálinum og aðrar tíðir ein meira avgjørdan, sum liggur uppat tjóðveldislinjuni. Eftir okkara tykki roynir løgmaður at fáa bæði stig fyri stig fólkini í flokki sínum og fullveldisfólkini nøgd, og tí hevur hansara linja verið so lunkað. Tá hann hevur tosað um breiðar semjur hevur tað ikki bert verið fyri at rætta eina hond út til Javnaðarflokkin men so sanniliga eisini fyri at varðveita sín egna flokk. At hann so hevur tikið ein av stig fyri stig monnunum í flokkinum og ein av teimum, sum torir at tosa ímóti Tjóðveldisflokkinum, Bjarna Djurholm, út í Tinganes at standa við sína lið, kemst av nettupp hesum sama: at vísa tí hóvliga partinum av flokkinum, at hann, løgmaður letur seg ikki manipulera av Høgna Hoydal, soleiðis sum stig fyri stig maðurin Birgir Danielsen vildi vera við. Tey, sum halda, at Bjarni Djurholm er fluttur úr Tinginum og út í Tinganes fyri at passivisera hansara álop á fullveldisætlanina mistaka seg. Hann er tvørturímóti settur út í Tinganes fyri at hjálpa løgmanni í psykologika stríðnum ímóti Høgna Hoydal & Co: hvussu broytir flokkurin linju uttan at missa ov nógv av sínum egnu til Tjóðveldisflokkin!

HVAT løgmaður so enn ger, so verður tað torført hjá honum at varðveita flokkin, sum var einki hent. Tí við at lata seg draga so langt út á fullveldisleið Tjóðveldisfloksins hevur hann eisini gingið einum parti av sínum veljarum á møti. Og nú at draga í land vil hava við sær, at nógvir fullveldissinnaðir fólkafloksmenn fara uppí Tjóðveldisflokkin. Tað er longu við at henda. So er spurningurin hvør floyur er í fleiritali! Eftir okkara tykki verður tað Djurholm, Breckmann, Danielsen floyurin, sum fer at vinna, og hetta hevur helst løgmaður eisini innsæð. Tí er Bjarni Djurholm við hansara lið í Tinganesi.

***Sosialurin***

# Fólkaflokkurin aðra kós í fullveldismálinum

*Vit eru ikki nøgdir við gongdina sum hon hevur verið í fullveldis málinum, siga teir báðir Jørgen Niclasen, fiskimálaráðharri og Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri*

ÓLAVUR Í BEITI

Jørgen Niclasen, landsstýrismaður í fiskivinnumálum, sum hevur verið við í samráðingunum við donsku stjórnina er alt annað enn nøgdur við gongdina, sum hon hevur verið higartil í fullveldis ætlanunum.

Hetta kom fram á fundi á Hotel Vágum mikukvøldið, tá ið Vága Fólkafloksfelag hevði boðað til fundar og har eisini nýggi vinnumálaráðharrin, Bjarni Djurholm, greiddi frá sínum málsøki, og hvørjar mennandi uppgávur liggja fyri framman at loysa hjá nýggja vinnumálaráðharranum.

– Alt hetta fundarvirksemið, sum verið hevur higartil, hevði eins væl kunnað verið orðnað við nøkrum e-meylum millum báðar samráðingarpartarnar, metir Jørgen Niclasen.

– Fólkaflokkurin hevur skilt, hvør fólksins vilji er, sigur Jørgen Niclasen víðari, og higartil hava allar kanningar víst, at meirilutin í fólkinum tekur ikki undir við upplegginum, sum lagt hevur verið fram og serliga útspælið frá dønum um skiftistíðina, hevur skapt ein ávísan ótta í fólkinum um eina ótrygga framtíð.

**Stig fyri stig**

– Fólkaflokkurin hevur skilt støðuna og er meiri sinnaður at fáa eina avtalu við donsku stjórnina heldur enn at alt skramblar saman og vit fáa einki burturúr, sigur fiskimálaráðharrin, og hetta er ikki bert hugsanin hjá Jørgen Niclasen, men eisini Bjarni Djurholm, vinnumálaráðharri, er samdur í hesum, at vit mugu vísa at vit duga at stjórna hesum landinum og hava ábyrgd, áðrenn vit taka fult ræði.

Bæði Bjarni Djurholm og Jørgen Niclasen taka tí undir við einum meiri sjónligum stig fyri stig politikki, har vit ístaðin fyri at berjast við danir fáa ein dialog ígongd og koma nærri eini loysn, hvør hon so enn verður. Men sambært hesum báðum landsstýrismonnum verður loysnin ikki eitt 4 ára skiftisskeið, sum danir halda fast um.

Tí verða aðrir bollar í súpanini nú á fundinum tann 26. oktober millum danir og føroyingar sambært hesum báðum landsstýrismonnum, men enn er nakað tíðliga at siga, hvussu endaliga uppleggið kemur at verða sett saman.

# Fylgjurnar álvarsligar koyrir tú ov skjótt

– Tað er dýrt, at koyra skjótari enn loyvt er. Hetta staðfestir Ferðslutrygd á heimasíðuni:

82 km/t = 7.100 krónur. Bótin er 3.000,- kr, eftirkannandi roynd er 900 kr. Undirvísing 2.200 kr. Koyritímar kosta 700 kr. Nýggj eftirkannandi roynd kostar 300 kr.

Tilsamans kostar hetta ferðslubrotið 7.100 krónur + nakrar vikur uttan koyrikort.

Hetta roknistykkið er eitt svar uppá, at tað í fjølmiðlum fleiri ferðir hevur ljóðað, at tú næstan kann koyra so skjótt, sum tú vilt, uttan at tað fær álvarsligar fylgjur.



Roknistykkið er grundað á, at tú koyrir 82 km/t ella 32 km/t skjótari enn loyvda ferðmarkið í bygdum øki, sum er 50 km/t. Siga vit, at talan ikki er um skerpandi umstøður - og at tú tí »einans« stendur til at fáa treytaða frádøming av koyrikortinum, so merkir tað, at tú missir ikki koyrikortið upp á staðið. Men í øllum førumført tú 3.000 krónur í bót, og áðrenn mánaður er gingin, skalt tú til eftirkannandi roynd hjá Bileftirlitinum, sum tilsamans kostar tær 900 krónur.

Tað vísir seg, at tey flestu, ið fara upp til roynd uttan at hava fingið undirvísing, standa ikki royndina, men dumpa frá hond. Um tú dumpar til royndina, sleppur tú ikki aftur til nýggja roynd, fyrr enn tú hevur fingið neyðuga undirvísing, ið kostar um 2.200 krónur. Harumframt mást tú rinda fyri í minsta lagi tveir koyritímar á 350 krónur.

Ikki fyrr enn koyrilærarin heldur, at tú ert førur fyri at fara aftur til roynd, ger hann eina royndarinnstilling, ið kostar 300 krónur.

Um vit siga, at tú nú stóð royndina, hevur tú framvegis treytaða dómin hangandi yvir høvdinum á tær tey næstu trý árini, so um tú gert eitt líknandi ferðslubrot - (koyrir við ov nógvari ferð, hevur meiri enn 0,5 promillu av alkoholi í blóðinum, ella fremur eitt álvarsligt koyrimistak) - áðrenn henda tíð er farin, missir tú koyrikortið treytaleyst.

Frá tí degi, tú komst í hesa »mylluna«, og til tú sleppur úr henni aftur, kunnu ganga fleiri vikur, og fleiri teirra uttan koyrikort. Men hesir »tvørleikar« fána burtur í einki, um bert tú hugsar eitt lítið sindur um, hvat ið kundi hent, um onkur var á vegnum, har tú koyrdi, sigur Ferðslutrygd.

# Heilsuskúli Føroya sum ein skúli

Sum fyrr skrivað í august í ár um tær nýggju útbúgvingarnar, sum skulu avloysa sjúkrahjálpara-, heimahjálpara- og pleygaraútbúgvingina.

Landsstýrismaðurin í skúla- og mentamálum, Tórbjørn Jacobsen, tók eina skjóta avgerð um, at skúlin skuldi verða í Suðuroy. Alt gott um tað, men tá okkara landsstýrismaður tekur eina slíka avgerð, má tað verða av tí, at hann hevur í huga nakað, sum er betri enn tann fyrra loysnin, sum var mær kunnugt ein samanlegging av sjúkrasystraskúlanum.

Tað sigur seg sjálvt, at við at leggja allar heilsuútbúgvingarnar á einum stað, fær tú eina betri útbúgving og eitt gott skúlaumhvørvi og virðing fyri hvørjari einkultari útbúgving, sum eisini vil geva eitt gott samstarv úti á arbeiðsplássunum, Tórbjørn, ikki í einum kommunuskúla.

Man skuldi trú, Tórbjørn, at tú hevur selt teg til tjóðveldismenninar á Tvøroyri. Tú bleiv jú landsstyrismaður í skúlamálum.

Tú sigur eisini, at eftirútbúgvingin hjá heimahjálparunum skal verða runt landið, sjálvandi skulu praktikkplássini verða runt landið, men sjálv undirvísingin skal verða í skúlanum, um tú ynskir kvalitet í tí nýggju almanna- og heilsuútbúgvingunum.

Ein bólkur, sum eisini hevur krav upp á eftirútbúgving, sokallaða uppskúlan, eru sjúkrahjálparar og pleygarar.



Sjálv havi eg verið í arbeiðsbólki, sum var við til at gera Álit um almanna- og heilsuútbúgvingar á miðnámsstigi, saman við øðrum fakfelagsformonnum. Arbeiðið var liðugt í apríl 1997 og varð tá latið táverandi skúlamálaráðharri, Eilifi Samuelsen. Eg vóni ikki, at okkara arbeiði er burturspilt. Tað er nógv brúk fyri øllum bólkunum í framtíðini. Vónandi noyðast tey ikki framyvir at flyta til Danmarkar fyri at fáa øaður nevndu útbúgvingar.

At hugsa sær ein skúla við navninum Heilsuskúli Føroya, sum umboðaði sjúrasystra-, almanna- og heilsuútbúgvingarnar í Føroyu, sigur tað ikki alt...

**Meta C. Palle**



## Hevur tú kannað rentuna?




Seinastu 12 mánaðirnar hevur íløgufelagið Altjóða Partabrøv hjá Kaupthing givið 54% í rentu og seinastu trý árini 113%. Nú kanst tú, sjálvt við fáum túsund krónum, gera íløgur í virðisbrøv. Støkk inn á gólvið hjá okkum ella einari av deildunum hjá Føroya Sparikassa og fá meiri at vita.

Rentan er roknað í tíðarskeiðunum fram til 1. september 2000. Søguligur vinningur er ikki trygd fyri framtíðar vinningi.

SANSIR TEL 355355

KAUPTHING
FØROYAR · ÍLØGUBANKI
Tinghúsvegur 14 • Tórshavn
Tel 351500 • Fax 351501
www.kaupthing.com